Hann man halda tað vera vera stuttligt at rógva út

Petur Háberg man halda tað vera stuttligt at rógva út, eftirsum hann letur ein stuttleikabát innregistrera til útróðrarbát. Annars haldi eg ikki, at Petur skuldi gjørt so nógv av at eyknevnt. Tað sømir seg ikki einum rætttrúgvandi, »Fjallið Oskar«, »Kókibókarithøvundurin« o.s.fr

Tað má haldast at vera ein løgin innregistrering, har hvørki navn ella nummar er á einum báti. Men einans eitt fabrikksmerki. Slíkt hevur í hvussu er ikki verið vanligt fyri útróðrarbátar í Føroyum.

Grátt undir steini

Hildnir fyri gjøldur

Ja, harmiligt er at skulla ásanna, at einki skil er innan okkara býráð nú á døgum. Mong lyfti hava verið givin, sum í heilum verða svikin, eins og einki spyrst burtur úr teimum mongu samráðingarfundunum við býráðið.

Fyri at siga sum er, so eru býráðslimir okkara ikki førir fyri at loysa tær mongu uppgávurnar, sum teimum verða litnar upp í hendi, eins og teir ikki eru førir fyri at loyva ungdómsspurningarnar, sum vit hava at stríðast við í dag.

Og tað verður tí av ongum hjá býráðnum at geva Bragdinum og Róðrarfelagnum innivist í róðrarneystinum hjá Havnar Róðrarfelag. Harmiligt at verða hildin fyri gjøldur. Og tí gekk ikki eftir ætlan, takkað verið býráðnum.

Við ítróttarkvøðu

Hans Birgir Hansen
borgari

Tey handilsligu útlondini

Jyllands-Posten, sum kemur út í Århus, veit at siga frá, at Danmark hevur tvey økir, sum altíð geva avlop í handilsjavnvág — og, skrivar blaðið: »Det er det nordatlantiske amter, Færøerne og Grønland«, sum handilsliga eru útlond.

fj Danmark flutti í 536 milj. kr. til Grønlands og fyri 378 milj. kr. til Føroya, meðan innflutt var til Danmarkar úr Grønlandi fyri 182 milj. kr. og úr Føroyum fyri 103 milj. kr.

Soleiðis var avlopið í handilsjavnvágini við Grønland 354 milj. kr. og 275 milj. kr. fyri Føroyar. Tølini fyri 1973 vóru ávikavist 336 og 161 milj. kr. 83 pst. av innflutninginum úr Danmark, úr Grønlandi og Føroyum er fiskur og fiskavørur, meðan »der fra Syddanmark sendes en lang række — især forædlede — varer til landets nordligste amter«.

BRØV

At hagtølini eru røtt man vera so nøkurlunda, men tað bilar í stórt mát hjá Jyllands-Posten at fylgja við hvat hendir, tí blaðið hevur enn ikki skilt, at Føroyar ikki eru amt, og at Grønland skal vera »Norddanmark« fyrikemur okkum at vera ein sonn skomm fyri eitt danskt blað at vísa sína lítlu vitan so »blamerandi«.

Hevði tað ikki verið ein uppgáva hjá Sosialinum at greitt donsku lesarunum frá føroysku viðurskiftunum, tí tað er sanniliga hugstoytt at síggja, hvussu eitt konservativt danskt blað háðar føroyingar og grønlendingar.

Ein lesandi

V-4 dráttur

Eitt ógvuliga hent tiltak fyri at royna at fáa pening til eini rúmlig útvarpshús.

Men er hetta ikki nakað egoistiskt? Kundu vit ikki tikið einar fýra dráttir um árið til nøkur góð endamál. Útvarpshúsini koma eins skjótt fyri tað.

Her hugsi eg serliga um felagið »Javna« og »Folkekirkens nødhjælp« og eini tvey onnur líknandi. Hetta er óivað eitt tingmál, men kann væl broytast, um vilji er. Og ikki verður undirtøkan minni fyri tað.

Kjølur

Hvussu skal tað skiljast?

Eg ætlaði at spyrja Jørmund Vágadal, hvussu tað skal skiljast, at tú ella eg skulu elska næsta okkara sum okkum sjálvan, og hvør er næsti okkara?

Og hvussu skal tað skiljast, at ein kann vera sum farisearin?

Fyri mær sær tað soleiðis út, at tað vera bara sambandsmenn, sum koma í Himmiríki, um Jørmund og onkur annar skal ráða. Hinir eru allir kolldømdir. Gott at vera so góður, so manglar bara at fáa eitt feitt fastlønt starv, meðan man bíðar, og tað vísa allir at dáma gott, so er man sikraður sjálvur.

Og tey, sum siga, at tað hevur einki at siga við tí verðsliga, vilja sum oftast hava mest av tí verðsliga.

So, hvørjum skal man so trúgva?

J.J.

filmir ið koma

Papillon

Í farnu viku fór Havnar bio undir fyrivísan av stórfilminum Papillon, sum er gjørdur yvir ta kendu bókina eftir Henri Charriére, har rithøvundurin sigur frá lívi sínum í fangalegum í fronskum Guyana. Hann varð dømdur til revsiarbeiði fyri lívstíð fyri at hava myrt ein alfons í Paris. Fleiri ferðir roynir hann at flýggja úr legunum við at sigla langar leiðir við smáum bátum og til endans — eftir stórar líðingar í 13 ár — vinnur hann frælsi.

Filmurin byrjar í einum fronskum býi, har fangarnir bíða eftir at verða fluttir í legurnar. Teirra millum er Henri Charriére, kallaður Papillon, tí hann hevur fingið brent ein firrvald í bringuna, sum er dømdur fyri morð, og Louis Degas, sum er dømdur fyri at hava falsað skjøl.

Umborð á skipinum gera Papillon og Degas av, at Papillon skal verja hin, sum hevur eina stóra peninganøgd uppi á sær, meðan Degas skal fíggja flóttanina hjá Papillon. Papillon bjargar bæði lívinum hjá Degas og pengum hansara, og teir gerast góðir vinir. Teir verða báðir fluttir til eina arbeiðslegu í frumskógini, og Degas er greiður yvir, at hann fer at doyggja, um hann ikki sleppur burtur haðani.

Tann fyrsta flóttanin hjá Papillon miseydnast púra. Hann verður fangaður, og revsingin verður gjørd strangari. Hann sleppur ur at sita einsamallur í einum fangabúri í tvey ár. Degas fær honum mat inn í búrið, samstundis sum hann setir seg sjálvan í eina torføra støðu. Hetta verður uppdagað og revsingin gjørd uppaftur strangari.

Hóast stórar líðingar og ómenniskjanslig kor fellur Papillon ikki í fátt, men ger nýggjar flóttarætlanir. Degas hjálpir honum við tí fíggjarliga, og ein annar fangi, Maturette, hjálpir honum eisini. Flóttanin tykist at eydnast, og teir koma allir tríggir til Columbia. Har verða Maturette og Degas særdir av skotum frá nøkrum hermonnum. Men Papillon, sum seinni verður særdur, flýggjar longur til eina bygd, har bert indianarar búgva. Høvdingin í bygdini tekur væl ímóti honum, og Papillon verður hjá honum leingi. Hann og tann vakra indianaragentan, Zoraima, finna saman, men tá Papillon fer úr bygdini, fáa fongsulsmyndugleikarnir at vita av honum gjøgnum slatur, og hann verður aftur tikin til fanga. Papillon verður sendur til Devlaoynna, har hann hittir vinmannin Degas, sum nú er niðurundirkomin.

Papillon hevur ein ómetaligan lívsvilja og roynir nýggjar flóttarætlanir. Tær eydnast, og hann er frælsur.

Teir báðir, Steve McQueen og Dustin Hoffmann, hava høvuðsleiklutirnar sum Papillon og Louis Degas.



Úr filminum Papillon

fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk

fk

Páskatilboð

Feskt íslendskt lambskjøt, heilir kroppar,

pr. kg. bert 11⁷⁵

Hetta sera bíliga tilboðið er treytað av, at kjøtið verður heintað í krambúðini.

fk

Tórshavn
Fuglafjørð
Klaksvík

fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk fk